**Góðu føroyingar. Góðu áhoyrarar.**

Tað er við eyðmýkt at skula standa og røða á júst sama staði sum Merkið veittraði fyri fyrstu ferð fyri neyvt 100 árum síðan. Eg vil tí fyrst av øllum takka fyriskiparunum fyri hetta megnar tiltak og fyri tann stóra heiður mær er sýndur sum verji hjá Flaggsiglingini og fyri møguleikan at siga nøkur orð, nú Merkið fyllir 100 ár.

***

Flaggið er okkara dýrabærasta samleikamerki. Men dúkurin, sum teir fýra studentarnir evnaðu til innanfyri hesar veggirnar fyri hundrað árum síðan, var ikki bara eitt uppskot til eitt flagg, sum skuldi umboða eitt land.

Tað, teir evnaðu til, var ein hugsjón um eitt land, ið tørvaði ein sterkari samleika. Ein samleika, ið skuldi vera við til at skapa menning og størri tilvit um egnan mátt millum føroyingar, júst sum okkara norðurlendsku grannar.

Nú 100 ár seinni eigur flaggið sítt fasta og ómissandi pláss í okkara tilveru. Tað er vorðið okkum sum land og sum fólk ein trúgvur fylgisneyti - tá vit hátíðarhalda okkurt, tá vit syrgja, ella tá vit gleðast. Her finna vit bæði íblástur og ugga.

Merkið – okkara tjóðarímynd ella súmbol - bleiv ikki til av sær sjálvum. Eitt heilt heimsstríð skuldi til, áðrenn greiða fekst á flaggspurninginum. Í tjúgu ár høvdu vit togast og kjakast, og líkt var til, at Merkið kanska heldur spjaddi enn savnaði føroyska fólki.

Í dag ivast ongin.

***

Eftir at bretar viðurkendu flaggið í 1940, og tað so varð viðurkent sum alment føroyskt flagg eftir kríggið, brúktu vit tað við størri varðsemi. Kanska meira hátíðarligt og formligt - vildi onkur sagt.

Í dag er Merkið hvørsmans ogn og verður brúkt til so at siga øll tonkilig høvi. Unga fólki hevur tikið tað til sín. Virðingin er kanska meira óformlig, men stoltleikin av og kærleikin til Merkið er ikki til at taka feil av. Hann er gróðursettur í teirra innastu sál.

***

**Góðu landsmenn og -kvinnur,**

Merkið hevur tað gott ímillum okkum í dag. Men eg nevndi at byrja við, at flaggið fyrst og fremst er ein hugsjón. Ein hugsjón um eitt land og eitt samfelag, ið áhaldandi skal flyta seg framá.

Føroyar er í dag ímyndin av einum framkomnum, ríkum og fjølbroyttum samfelag, ið ættarlið omaná ættarlið hava skapt. Eitt samfelag sum á flestu økjum er komið langt á leið. Eisini í altjóða samfelagnum.

Hóast vit – føroyingar allir sum ein – hava tikið Merkið til okkum, so hevur heimurin tað ikki. Vit eru sum samfelag avmarkaði og sleppa ikki at luttaka har vit eiga og skulu.

"har í merkini veitra veittri eisini mítt" yrkir Hans Andrias. Hetta er ein sannleiki við tillaging. Tí so at siga allir samfelagsbólkar **eru** – tá tað snýr seg um alheims luttøku - avmarkaðir í sínum virksemi.

Hetta má broytast og á okkara 100 ára degi eiga vit at lova hvør ørðum alla tíðina at vinna Merkinum størri rúmd og virðing í altjóða samfelagnum.

***

**Góðu tit øll.**

Flaggið, sum varð tilevnað her fyri 100 árum síðan, livir nú sítt egna lív. Tað ber boð um eina tjóð, sum ikki bara hevur tikið til takkar við tí sum er ella hevur verið. Tað endurspeglar brøgd og fólk, sum hava sprongt karmar og gingið nýggjar leiðir í politikki, vinnulívi, list, máli, ítrótti og nógvum øðrum viðurskiftum.

Tey sum tora, vilja, tíma og duga at flyta mørk, eru tey, sum seta dagsskrá og flyta okkara samfelag. Valla finst nakað betri dømi um hetta enn, tá ið Merkið fyri hundrað árum síðan veittraði júst her á fyrsta sinni.

Tað var byrjanin til tær Føroyar, vit kenna í dag. Og við flagginum sum oddvita kunnu vit sum fólk og land við góðum treysti fara undir – tey næstu hundrað árini – at byggja land við Merkinum fremst.

Takk fyri, og til lukku við Merkinum, øll somul. Merkið leingi livi.